Hendingaríkt ár

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevði um vikuskiftið aðalfund. Annað árið í trý ára setuni er farði afturum bak, og sigur felagið, at árið farna árið hevur verið hendingaríkt og spennandi. Millum annað broytti felagið eisini navn í oktober mánaði í fjør

Í nevndini hjá Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar eru: Jana H. Dalsgaard, forkvinna, Óluva Lómstein, næstforkvinna, Anna Maria Simonsen, nevndarlimur, Æna Rienert, nevndarlimur, Hervør Eidesgaard, nevndarlimur, Turið Zachariassen, nevndarlimur, Elsa Vest, nevndarlimur og Anna Samuelsen, tiltakslimur
Mynd: Eirikur Lindenskov

AÐALFUNDUR
Ingrid Bjarnastein

Um vikuskiftið hevði Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar aðalfund. Hetta var fyrsti aðalfundurin við nýggja navninum, og annað árið í trý ára setuni hjá nevndini í felagnum.

Eini hundrað limir vóru møttir upp á aðalfundinum, og metir felagið hetta vera sera gott, av tí, at talið á virknum limum er 585. Havast skal so eisini í huga, at limirnir arbeiða jú døgnið runt, hvønn dag í vikuni og eru kring allar Føroyar, so tað ber ongantíð til at savna allar saman.

Felagið sigur, at farna árið hevur verið hendingaríkt og sera spennandi og krevjandi ár.

Nýggja sjúkrarøktarfrøðingaútbúgvingin, navnabroytingin og sáttmálasamráðingar hava fylt ein stóran part av árinum.

Útbúgvingin

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar metir, at nýggja útbúgvingin er eitt stórt framstig, helst tað størsta hjá sjúkrarøktini í nýggjari tíð, og samstundis eisini ein stór avbjóðing.

Eftir nýggju lógini er útbúgvingin nú fýra ár til longdar og er býtt sundur í lestrarhálvur. Hon endar við eini bachelorverkætlan, og soleiðis fær tann sjúkrarøktarfrøðingalesandi bachelor heitið, tá prógvið er lokið. Sjálv útbúgvingin fer fram á Sjúkrarøktafrøðiskúla Føroya í samstarvið við Fróðskaparsetur Føroya, sum skal tryggja vísundaliga støði í bachelor útbúgvingini. Við nýggju lógini verður útbúgvingin í sjúkrarøktarfrøði í Føroyum viðurkend sum akademiskt disiplin, og tað fegnast tey í felagnum um.

Í oktober mánaði í fjør fekk felagið, sum áður æt Sjúkrasystrafelag Føroya, nýtt heitið. Avgjørt varð á eykaaðalfundi, at nýggja navnið skuldi vera Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Felagið sjálvt fegnast um nýggja heitið, og við tað, at orðið »systir« ikki longur er við, so verður eisini latið upp fyri monnunum, so spennandi er at vita um teir nú fara at gerast fleiri í tali.

Gott 100 limir møttu upp til aðalfundin um vikuskiftið
Mynd: Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

Fundur um brúkaramál í Norðurlandahúsinum

Mánakvøldið skipar Brúkararáðið fyri almennum fundi við danska brúkaraumboðsmanninum. Eisini verður pallborð við umboðum fyri brúkarar í Føroyum, vinnu, landsstýri og politisku flokkarnar

BRÚKARAMÁL
Tíðindaskriv

Mánakvøldið tann 24. mars 2003 kl. 19.30 skipar Brúkarasamtakið fyri almennum pallborðsfundi í Klingruni í Norðurlandahúsinum um evnið: Er brúk fyri nýggjari brúkaralóggávu og brúkarastovni í Føroyum?

Hvussu kunnu vit skipa brúkaravernd í Føroyum?

Høvuðsrøðari verður danski Brúkaraumboðsmaðurin Hagen Jørgensen. Hann fer at greiða frá, praktiska týdningin av danskari brúkaralóggávu í nýggjari tíð, samanbera við norðurlendsk og altjóða viðurskifti og harumframt greiða frá sínum luti sum brúkaraumboðsmaður í Danmark.

Hereftir fáa umboð fyri brúkaran, vinnuna, landsstýrið og politisku flokkarnar á løgtingi høvi at framføra sína sjónarmið, um tey halda tað er brúk fyri nýggjari brúkaralóggávu og brúkarastovni í Føroyum, og um hvussu tey halda vit kunnu skipa brúkaravernd í Føroyum.

Skráin fyri pallborðsfundin verður hendan: 19.30 Fundurin verður settur, 19.45 Danski Brúkaraumboðsmaðurin Hagen Jørgensen heldur røðu, 20.30 Framløgur frá pallborði: Brúkarasamtakið, Vinnuhúsið, Landsstýrismaðurin í Vinnumálum, 20.40 Steðgur. 20.55 Framhald við framløgum frá pallborði: umboð fyri teir 6 politisku flokkarnar á løgtingi, 21.15 Orðaskifti við pallborðsluttakararnar og brúkaraumboðsmannin, 22.00 Liðugt

– Fundurin er almennur, og vónandi verður undirtøkan stór, so brúkarar kunnu nýta hetta høvið at koma til orðanna og gera vart við støðu okkara og tey krøv, sum mugu setast fyri at bøta um viðurskiftini hjá brúkarum í Føroyum í dag. Tí hava eisini limirnir í Brúkarasamtakinum, allir tinglimir, umboð fyri vinnuna og fjølmiðlar fingið serstaka áheitan um at verða við, sigur Brúkarasamtakið í tíðindaskrivi.

Hans Pauli Strøm, skrivari, Ingun Simonsen, formaður og Gunnleivur Dalsgarð, nevndarlimur í Brúkararáðnum

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at góða systir okkara

Elsebeth C. Kristensen
kallað *Ebba*, fødd Weihe á Selatrað

andaðist í Keypmannahavn sunnudagin 16. mars,
89 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Brøndby Øster kirkju
fríggjadagin 21. mars kl. 12.00.

Fyri tey avvarðandi
Lena

Hópur av tiltøkum í Sunda kommunu

Ein hópur av tiltøkum hava verið í Sunda kommunu í hesum árinum, og helmað verður ikki í fyrr enn, 28. juni, tá ið Sunda Róðrarfelag skipar fyri jóansøkubáli

Tað hevur ikki verið neyðugt hjá fólki í Sunda kommunu at keða seg í hesum árinum. Nógv tiltøk hava verið á skránni, og helmað verður ikki í fyrr enn 28. juni

VÁRTILTØK
Vilmund Jacobsen

Í Sunda kommunu eru fleiri feløg, bæði ítróttarfeløg, ungmannafelag, og har eru eisini skótar, umframt bókasavnsnevnd og kirkjuráð.

Bæði børn og vaksin eru limir í hesum feløgum, og nógv eru sjálvsagt limir í meira enn tí eina felagnum.

Varpa ljós…

Uppundir endan av seinasta ári tóku fólk í kommununi stig til at »varpa ljós á kommununa…«, sum tey rópa tað.

Á fundi varð avgjørt at seta eina nevnd við einum umboði úr hvørjum av hesum feløgum, nevndum og ráðum, og Sunda kommuna fekk tvey umboð í nevndina.

Umboðini hjá kommununi eru tvær kvinnur, Thordis Dahl Hansen og Hansina Johannesen.

Endamálið hjá nevndini var at savna saman ymisk »vártiltøk« í eina skrá, sum røkkur heilt fram til jóansøkubálið, ið Sunda Róðrarfelag skipar fyri við bátahylin á Oyrabakka, 28. juni.

Jóansøkubálið er eitt afturvendandi tiltak hjá róðrarfelagnum. Her plaga tey eisini at selja pylsur og búffar, eins og børnini sleppa at ríða á hestbaki.

Drúgv skrá

Tiltøkini í Sunda kommunu byrjaðu longu í januar, tá ið Freydis Poulsen í barnaskúlanum á Oyrabakka greiddi frá brotum úr Norðskála søgu.

Í februar helt Knút Simonsen fyrilestur um streym og sjóvarfall, og aftur í februar greiddi Freydis Poulsen frá brotum úr Svínáar søgu.

Skipað hevur eisini verið fyri bingo, barnadansi, dansi, føroyskum dansi og føstulávintstiltaki.

Lestur var í Norðskála kirkju, 5. mars, og føstugudstænasturnar eru eisini við í skránni.

Vikuskiftið, 8. og 9. mars, var stór talvkapping í Eydnuni, har allir luttakararnir fingu skreytblað sum minnið um, at teir vóru við í kappingini.

Í dag, 20. mars, fer Freydis Poulsen aftur at greiða frá. Hesaferð fer hon at siga frá brotum úr Oyra søgu.

Sunnudagin, 23. mars, verður judokapping og framsýning av judo í Felagsskúlanum á Oyrabakka.

Gallaveitsla

29. mars er eitt serstakt og sera áhugavert tiltak á skránni; tá verður gallaveitsla í Eydnuni. Hetta verður ikki nøkur vanlig veitsla, men ein veitsla við rættiligum »stíli« yvir sær.

Birgir Enni verður kokkur, og hann fer at borðreiða við alskyns sjógæti úr Sundalagnum, eitt nú fiski, skeljum, rækjum, hummara og øllum tí, sum annars er hugsandi at finna í Sundalagnum.

Við sær hevur Birgir ein vinmann úr Íslandi, sum eisini er kokkur og eigur matstovu í Reykjavík

Um kvøldið verður dansur, har GHM fer at spæla.

Atgongumerkini kosta 250 krónur og kunnu keypast fram til, 22. mars. Avmarkað atgongd er til hesa forkunnugu og spennandi veitslu, so skilagott er hjá teimum, ið ætla sær at verða við, at keypa sær atgongumerki sum skjótast.

Ætlanin er at fáa nøkur ung úr kommununi at skipa fyri skemti á gallaveitsluni.

Onnur tiltøk

Vikuskiftið, 5. og 6. apríl, verður patchworkframsýning í skótahúsinum á Oyri. Her fara nakrar kvinnur, ið hava gjørt patchwork lutir, at sýna fram tað, sum tær hava seymað burtur úr ymiskum snøklum av toyi.

Í døgunum, 11.-16. apríl, verður teldutreff í Eydnuni á Oyrabakka. Tá kann ein og hvør, sum hevur hug, taka telduna í bilin ella trillubøruna og seta hana upp í Eydnuni til spæl, chatt og alt tað, ið hugsast kann.

Flaggdagshald verður, 25. apríl, har skótaliðið, Knúkur, skipar fyri. Skikka veðurgudarnir sær væl, verður tiltakið úti. Annars verður tað í eydnuni á Oyrabakka.

Ætlanin er at hava eina listaframsýning, 3. og 4. mai, í skálanum í barnaskúlanum á Oyrabakka. Málið er at fáa fólk, sum arbeiða list í kommununi, at sýna fram.

12. mai verður musikandakt í kirkjuni á Norðskála. Kór Glyvra kirkju fer at syngja undir leiðslu av Meinhardi Bjartalið, presti. Emil Olsen, prestur, verður eisini við.

Heldur veðrið sær, verður ein stórur marknaðardagur á skúlaplássinum við Felagsskúlan, 16. mai, har ymiskir lutir verða seldir. Viðrar ikki, verður marknaðurin í Eydnuni í staðin.

Seinastu tiltøkini í hesum umfarinum verða 17. mai, tá ið Sunda Byrsufelag fer at skipa fyri skjótikapping og 28. juni, tá ið Sunda Róðrarfelag skipar fyri jóansøkubálinum.

Kórvenjing

Hvørt týskvøld, síðan skráin yvir vártiltøk í Sunda kommunu fór av bakkastokki, hevur kórvenjing verið í barnaskúlanum á Oyrabakka.

Venjingarnar byrjaðu, 4. februar, og tað er Hans olivur Joensen, sum er ættaður úr kommununi, men býr í Havn, ið hevur tikið sær av hesum.

Sum skilst, hevur hetta tiltakið fingið rættiliga góða undirtøku.

Ætlanin er, at kórið skal framføra sang á flaggdagshaldinum, 25. apríl, og møguliga á gallaveitsluni, 29. mars.